# Føroyingar og arbeiðslív

Hvat fær føroyingar at trívast í sínum starvi, og hvat fær okkum at leita víðari? Ein kanning um starvsnøgdsemi, arbeiðsynski, arbeiðspláss og týdningin av tí góðu starvslýsingini.



Spyr.fo

Kanningin er gjørd av Spyr.fo 28. - 30. apríl 2025 og 1027 føroyingar í aldrinum 18-67 kring alt landið svaraðu.

alfred

# Inngangur

Tað verður alsamt meiri neyðugt, at arbeiðsgevarar og HR-fólk, sum vilja finna og halda uppá tey røttu starvsfólkini, skilja, hvat fólk veruliga leggja dent á í arbeiðslívinum. Henda kanning er ætlað sum eitt íkast til hesa vitan og gevur gott innlit í, hvat fær fólk at trívast, og hvat fær tey at hyggja seg um eftir øðrum starvi.

Tey 1027 fólkini sum svaraðu kanningini, fortelja okkum millum annað, at løn, fleksibilitetur og møguleiki at arbeiða sjálvstøðugt viga tungt. Eisini vísir kanningin, at góðir starvsfelagar, góð leiðsla og møguleikin at mennast í starvinum eru høgt í metum.

Kanningin vísir eisini, at tann góða starvslýsingin hevur ein týðandi leiklut, og at har er pláss til munandi betringar. Ein væl orðað starvslýsing, sum greitt vísir hvørjar væntanir og møguleikar starvið hevur við sær, ger arbeiðsplássið meira lokkandi og fær tey røttu at søkja.

Við hesi frágreiðing fáa arbeiðsgevarar og HR-fólk eitt virðismikið amboð, sum kann brúkast sum íblástur og vegleiðing til, hvussu tey kunnu menna arbeiðsplássið, styrkja starvslýsingarnar og betra um møguleikan at draga tey bestu starvsfólkini til sín.

Kanningin tekur partvíst útgangsstøði í Kandidatanalysen hjá Konsulenthuset Ballisager, og sostatt ber eisini til í summum førum at samanbera við donsku úrslitini. (https://ballisager.com/kandidatanalysen)

**Allan Dalsgarð**
Stjóri, Alfred og Spyr.fo

# Samandráttur til leiðarar og HR

### Fleksibilitetur er ein toppskorari

Tilboð um fleksibla arbeiðstíð og møguleiki fyri at arbeiða heima er høgt í metum serliga hjá yngri starvsfólki og kvinnum.

### Tann góða starvslýsingin dregur fleiri umsøkjarar

Týðilig lýsing av arbeiðsuppgávum, førleikakrøvum og virðum er tað, starvssøkjandi sakna mest. Legg orku í góðan tekst.

### Lønin er framvegis ein drívmegi – men ikki tann einasta.

Ver opin um lønina í starvslýsingum. Tað vísir opinleika og økir møguleikan at fáa røttu umsøkjararnar.

### Góðir starvsfelagar eru gull

Miðvíst trivnaðararbeiði og ein inkluderandi arbeiðsmentan eru sterkir kappingarfyrimunir.

### Leiðarin bæði styggir og dregur

Stjórin er ein tann mest avgerandi orsøkin til bæði trivnað og starvsskifti. Raðfest leiðslumenning og gott samskifti.

### Útbúgving og persónlig menning fáa fólk at trívast

Tey sum síggja menningarmøguleikar, eru meira nøgd. Bjóða vegleiðing, skeið og innanhýsis møguleikar at vaksa í starvinum.

### Bonus og lønarískoyti rigga – men bara fyri summi

Menn og yngri starvsfólk leggja meira í lønarfyrimunir sum bonus.

### Arbeiðsplássið sjálvt hevur stóran týdning

Smáar og miðalstórar fyritøkur eru serliga lokkandi fyri ung. Stórar fyritøkur og almenni geirin draga meira hjá eldri.

### Starvsfólkabranding er lykilin

Vís og lýs tykkara arbeiðsmentan, virðir og leiðslustíl á ein ektaðan og visuellan hátt. Tað skapar álit og dregur fólk, sum passa inn.

### Lurta regluliga eftir starvsfólkunum

Ein slík kanning, gjørd internt, kann eisini brúkast sum amboð í tykkara HR-arbeiði. Hvat arbeiða fólk fyri og hví fara tey víðari?



# Eru føroyingar nøgdir við sítt starv?

Hvat ávirkar trivnaðin og hvussu broytist hann millum ymiskar starvsbólkar? Í hesum partinum varpa vit ljós á, hvussu føroyingar sjálvir meta um sítt starv og arbeiðsumhvørvi. Hvat hevur týdning og hvar er rúm er fyri betring.

# Nøgdsemi og arbeiðspláss

## Starvsnøgdsemi býtt eftir slag av arbeiðsplássi.

Lutfall sum hevur svarað "Sera væl nøgd/ur" upp á spurningin "Ert tú nøgd/ur við títt starv?"




# Nøgdsemi og arbeiðstíð

## Hvussu nógvar tímar arbeiðir tú um vikuna fyri tín arbeiðsgevara?

Lutfall sum hevur svarað "Sera væl nøgd/ur" upp á spurningin "Ert tú nøgd/ur við títt starv?"




Spyr.fo alfred

# Nøgdsemi kyn og aldur

Lutfall sum hevur svarað "Sera væl nøgd/ur" upp á spurningin "Ert tú nøgd/ur við títt starv?"







!

- Sjálvstøðugt vinnurekandi eru munandi betri nøgd við teirra starv enn løntakarar
- Menn eru betri nøgdir enn kvinnur, og tey eldru eru betri nøgd enn tey yngstu
- Starvsfólk í privatum fyritøkum eru betri nøgd enn alment og kommunalt sett starvsfólk

# Starvsskifti og orsøkir

Hví velja fólk at fara víðari? Í hesum partinum kanna vit, hvat fær føroyingar at skifta starv – og hvørjar orsøkir verða nevndar oftast. Úrslitini kunnu geva íblástur til leiðarar, sum vilja skilja og ávirka hesar avgerðir.



# Hvat stýrir val av starvi?

Hvat hevur størstan týdning fyri teg næstu ferð, tú leitar eftir einum nýggjum starvi? (vel upp í 3 møguleikar)




- **Topp 3 mest týðandi orsøkir eru løn, fleksiblar arbeiðstíðir og góðir starvsfelagar**

# Hvat stýrir val av starvi?

Hvat hevur størstan týdning fyri teg næstu ferð, tú leitar eftir einum nýggjum starvi? (vel upp í 3 møguleikar)

| | Øll | 18-34 ár | 35-50 ár | 50+ ár | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| At lønin er góð | 52% | 61% ↑ | 57% ↑ | 45% ↓ | 58% ↑ | 47% ↓ |
| Fleksiblar arbeiðstíðir og javnvág millum arbeiðslív og privatlív | 41% | 47% ↑ | 44% | 36% ↓ | 42% | 41% |
| Eg fái góðar starvsfelagar | 32% | 39% ↑ | 34% | 27% ↓ | 28% | 36% |
| Eg fái ein góðan leiðara | 22% | 27% ↑ | 22% | 20% | 16% ↓ | 27% ↑ |
| Eg fái møguleikan at mennast | 22% | 31% ↑ | 22% | 17% ↓ | 19% | 24% |
| Eg fái møguleikan at hava ávirkan | 20% | 17% | 21% | 20% | 21% | 19% |
| Tryggleiki er í starvinum | 14% | 14% | 14% | 14% | 17% | 11% |
| Arbeiðsplássið hevur góð virðir, sum tað livir upp til | 13% | 13% | 12% | 14% | 10% | 16% |
| Arbeiðsplássið avrikar nakað meiningsfult fyri samfelagið | 12% | 8% | 12% | 13% | 10% | 14% |
| Eg fái møguleikan at avansera í starvinum | 5% | 5% | 7% | 3% | 6% | 4% |
| Fyritøkan veitir dygdarvørur ella -tænastur | 5% | 5% | 3% | 6% | 6% | 3% |
| Arbeiðsplássið hevur eitt gott brand/umdømi | 4% | 6% | 3% | 3% | 4% | 4% |
| Annað | 4% | 1% | 2% | 6% | 4% | 3% |

*Pílur upp og niður merkir signifikant frávik frá miðal*

!

- **Menn raðfesta løn hægri enn kvinnur. Kvinnur raðfesta ein góðan leiðara hægri enn menn**
- **Tey ungu raðfesta løn hægst av øllum og raðfesta harumframt møguleikan at mennast í starvinum høgt**

# Hvat stýrir val av starvi?

Hvat hevur størstan týdning fyri teg næstu ferð, tú leitar eftir einum nýggjum starvi? (vel upp í 3 møguleikar)

| | Øll | Long víðari útbúgving (longri enn 4 ár) | Miðallong víðari útbúgving (2-4 ár) | Stutt víðari útbúgving (1-2 ár) | Handverkara -útbúgving | Fólkaskúli | Miðnám |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| At lønin er góð | 52% | 53% | 52% | 49% | 64% ↑ | 42% ↓ | 55% |
| Fleksiblar arbeiðstíðir og javnvág millum arbeiðslív og privatlív | 41% | 50% ↑ | 41% | 36% ↓ | 43% | 33% ↓ | 35% ↓ |
| Eg fái góðar starvsfelagar | 32% | 24% ↓ | 36% | 39% ↑ | 27% ↓ | 27% ↓ | 34% |
| Eg fái ein góðan leiðara | 22% | 14% ↓ | 24% | 21% | 18% | 25% | 31% ↑ |
| Eg fái møguleikan at mennast | 22% | 24% | 24% | 21% | 16% ↓ | 8% ↓ | 21% |
| Eg fái møguleikan at hava ávirkan | 20% | 28% ↑ | 22% | 17% | 15% ↓ | 14% ↓ | 5% ↓ |
| Tryggleiki er í starvinum | 14% | 13% | 14% | 13% | 24% ↑ | 12% | 11% |
| Arbeiðsplássið hevur góð virðir, sum tað livir upp til | 13% | 10% | 14% | 17% | 10% | 11% | 15% |
| Arbeiðsplássið avrikar nakað meiningsfult fyri samfelagið | 12% | 18% ↑ | 12% | 8% | 4% ↓ | 6% ↓ | 6% ↓ |
| Eg fái møguleikan at avansera í starvinum | 5% | 8% | 4% | 2% | 5% | 3% | 6% |
| Fyritøkan veitir dygdarvørur ella -tænastur | 5% | 4% | 5% | 5% | 5% | 6% | 5% |
| Arbeiðsplássið hevur eitt gott brand/umdømi | 4% | 2% | 3% | 6% | 2% | 2% | 9% ↑ |
| Annað | 4% | 3% | 3% | 3% | 6% | 8% | 1% |

*Pílur upp og niður merkir signifikant frávik frá miðal*

!

- **Fleksibilitetur hevur mest at siga fyri tey við longum útbúgvingum**
- **Lønin hevur mest at siga fyri tey við handverkaraútbúgving**
- **Ávirkan á starvið og sosial ábyrgd hevur lutfalsiga nógv at siga fyri tey við longum útbúgvingum**

# Orsøkir til at skifta starv

Seinast tú valdi at skifta starv, hvørjar vóru orsøkirnar?




**!**

- **Eyðsýndu orsøkirnar eru betri løn og betri starv**
- **Harumramt eru høvuðsorsøkirnar viðurkenning, fleksibilitetur og ónøgd við stjóran**

# Orsøkir til at skifta starv

## Seinast tú valdi at skifta starv, hvørjar vóru orsøkirnar?

| Orsøkir | Øll | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|---|
| Eg fekk bara eitt sindur betri starv | 30% | 31% | 28% |
| Møguleiki fyri hægri løn | 28% | 36% ↑ | 20% ↓ |
| Føldi ikki, at mítt íkast var virðismett | 21% | 16% ↓ | 26% ↑ |
| Nýggja starvið hevði smidligari arbeiðstíðir | 21% | 22% | 19% |
| Eg var ónøgd/ur við stjóran | 20% | 14% ↓ | 26% ↑ |
| Arbeiðsbyrðan var ov stór | 17% | 11% ↓ | 23% ↑ |
| Eg mentist ikki | 14% | 15% | 12% |
| Vantandi felagskensla á arbeiðsplássinum | 11% | 9% | 14% |
| Vantandi ávirkan á avgerðir | 11% | 11% | 12% |
| Eg saknaði stoltleika um tað, vit avrikaðu fyri samfelagið og kundar | 10% | 9% | 11% |
| Uppgávurnar vóru keðiligar | 10% | 13% | 8% |
| Ósemjur við starvsfelagar fyltu ov nógv | 7% | 6% | 8% |

*Pílur upp og niður merkir signifikant frávik frá miðal*

| Orsøkir | 18-34 ár |
|---|---|
| Eg fekk bara eitt sindur betri starv | 30% |
| Møguleiki fyri hægri løn | 32% |
| Føldi ikki, at mítt íkast var virðismett | 29% |

| Orsøkir | 35-50 ár |
|---|---|
| Eg fekk bara eitt sindur betri starv | 28% |
| Møguleiki fyri hægri løn | 34% |
| Føldi ikki, at mítt íkast var virðismett | 22% |

| Orsøkir | 50+ ár |
|---|---|
| Eg fekk bara eitt sindur betri starv | 31% |
| Møguleiki fyri hægri løn | 20% |
| Føldi ikki, at mítt íkast var virðismett | 17% |

!

- **Topp 3 ørsøkir til at skifta starv eru betri starv, betri løn og størri fleksibilitetur**
- **Høvuðsorsøkir at fara úr gamla starvinum eru vantandi viðurkenning, ónøgd við stjóran og ov stór arbeiðsbyrða**
- **Menn fara eftir hægri løn, meðan kvinnur fara eftir betri starvi**

# Tann góða **starvslýsingin**

"You never get a second chance to make a first impression". Starvslýsingin kann vera einasti møguleikin at fanga rætta umsøkjararan, og tí ræður um at gera sær ómak og fáa alt við. Her síggja vit, hvat starvssøkjandi sakna oftast, og hvussu tit kunnu gera tykkara starvslýsingar meiri fangandi og álítandi.



# Tann góða starvslýsingin

Hvat sakna føroyingar oftast í starvslýsingum?




!

- **Lønin fyllir mest, tá ið føroyingar leita eftir starvi, men er samstundis eisini tað, ið er mest saknað í starvslýsingum**
- **Harumframt er ein greiðari lýsing av arbeiðsuppgávum stórliga saknað av teimum starvssøkjandi**
- **Arbeiðsgevarar kunnu gera sær størri ómak við teksti og innihaldi og at lýsa kravdar førleikar betri**




# Mest lokkandi arbeiðsplássini

Stór, smá, almenn, privat. Hvørji arbeiðspláss eru mest lokkandi og fyri hvønn? Her síggja vit, hvat ymsir starvsbólkar halda um ymisk sløg av arbeiðsplássum.

# Mest lokkandi arbeiðsplássini

Hvat slag av arbeiðsplássi er mest lokkandi fyri teg?




!

- **Áhugin er størstur fyri privatum arbeiðsplássum**
- **Áhugin fyri at starvast á almennum stovnum er stórur, men áhugin fyri kommunalum størvum er lægstur**

# Mest lokkandi arbeiðsplássini

Hvat slag av arbeiðsplássi er mest lokkandi fyri teg?

| | Øll | 18-34 ár | 35-50 ár | 50+ ár | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Smærri ella miðalstór privat fyritøka (11-50 starvsfólk) | 21% | 30% ↑ | 23% | 16% ↓ | 21% | 20% |
| Almennur stovnur | 19% | 13% ↓ | 20% | 20% | 9% ↓ | 29% ↑ |
| Stór privat fyritøka (fleiri enn 50 starvsfólk) | 17% | 17% | 19% | 15% | 20% | 12% ↓ |
| Sjálvstøðugt vinnurekandi | 12% | 10% | 11% | 13% | 13% | 10% |
| Lítil privat fyritøka (1-10 starvsfólk) | 11% | 14% | 9% | 12% | 11% | 12% |
| Starv á sjónum | 10% | 7% | 9% | 11% | 18% ↑ | 0% ↓ |
| Kommuna | 5% | 5% | 4% | 6% | 4% | 6% |
| Kommunalur stovnur | 4% | 3% | 3% | 6% | 2% | 7% |

*Pílur upp og niður merkir signifikant frávik frá miðal*

!

- **Kvinnur hava størstan áhuga í at starvast á almennum stovni**
- **Menn eru drignir at privatu vinnuni umfram starvi á sjónum**
- **Tey yngru leita til privatu vinnuna og í minni mun til almenn og kommunal størv**

# Mest lokkandi starvsfólka-ágóðarnir

Fólk vænta sær meira enn bara løn. Í hesum partinum varpa vit ljós á, hvørjir starvsfólkaágóðar eru hægst í metum hjá ymsum starvsbólkum.



# Mest lokkandi starvsfólkaágóðarnir

Hvørjir starvsfólkaágóðar hava størstan týdning fyri teg?




!

- **Topp 3 starvsfólkaágóðarnir snúgva seg allir um frælsi: Fleksibilitet, heimaarbeiðspláss og styttri arbeiðsviku**
- **Fleksiblar arbeiðstíðir er nógv tann mest eftirspurdi ágóðin**

# Mest lokkandi starvsfólkaágóðarnir

Hvørjir starvsfólkaágóðar hava størstan týdning fyri teg?

| | Øll | 18-34 ár | 35-50 ár | 50+ ár | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fleksiblar møtitíðir | **57%** | 56% | 61% | 53% | 54% | 59% |
| Møguleiki fyri at arbeiða heimanífrá | **30%** | 33% | 32% | 27% | 23% ↓ | 37% ↑ |
| Styttri arbeiðsvika | **29%** | 31% | 31% | 27% | 19% ↓ | 39% ↑ |
| Annað | **21%** | 19% | 20% | 23% | 25% | 18% |
| Bonus – partur av vinningi felagsins | **15%** | 21% ↑ | 15% | 12% | 26% ↑ | 4% ↓ |
| Kantina við góðum mati | **12%** | 14% | 14% | 10% | 16% | 9% |
| Ókeypis atgongd til heilsutænastur (massasja, sálarfrøðing o.s.fr.) | **11%** | 16% ↑ | 11% | 8% | 8% | 14% |
| Óavmarkað barnasjúkrafrávera | **9%** | 22% ↑ | 12% | 1% ↓ | 5% | 14% ↑ |
| Nýmótans skrivstovur og teldur | 8% | 5% | 9% | 8% | 8% | 7% |
| Betri barsilsmøguleikar enn lógin ásetur | 6% | 18% ↑ | 5% | 0% ↓ | 5% | 6% |

*Pílur upp og niður merkir signifikant frávik frá miðal*

!

- **Menn og ungdómurin ynskja sær í størri mun fíggjarligan ágóða við bonusskipan**
- **Kvinnur ynskja í nógv størri mun heimaarbeiðspláss og styttri arbeiðsviku enn menn gera**
- **Kvinnur og tey yngru raðfesta harumframt familjuviðurskifti sum barsil og barnasjúkrafráveru**

# Bakgrund

Kanningin er gjørd av Spyr.fo 28. - 30. apríl 2025 og 1027 føroyingar í aldrinum 18-67 kring alt landið svaraðu.

| Bakgrund hjá respondentum | Prosent |
|---|---|
| **Kyn** | |
| Kvinnur | 52% |
| Menn | 48% |
| **Aldur** | |
| 50+ ár | 44% |
| 35-50 ár | 37% |
| 18-34 ár | 19% |
| **Hvørja útbúgving hevur tú? (hægsta gjøgnumførda útbúgving)** | |
| Miðallong víðari útbúgving (2-4 ár) | 45% |
| Long víðari útbúgving (longri enn 4 ár) | 20% |
| Stutt víðari útbúgving (1-2 ár) | 11% |
| Handverkarabúgving | 9% |
| Miðnámsskúli | 8% |
| Fólkaskúli | 7% |
| **Hvat slag av arbeiðsplássi arbeiðir tú á í dag?** | |
| Almennur stovnur | 28% |
| Stór privat fyritøka (fleiri enn 50 starvsfólk) | 19% |
| Smærri ella miðalstór privat fyritøka (11-50 starvsfólk) | 10% |
| Kommunalur stovnur | 9% |
| Lítil privat fyritøka (1-10 starvsfólk) | 7% |
| Kommuna | 7% |
| Sjálvstøðugt vinnurekandi | 6% |
| Starv á sjónum | 6% |
| Havi einki arbeiði | 3% |
| Annað/Veit ikki | 3% |
| **Hvussu nógvar tímar arbeiðir tú í miðal um vikuna hjá tínum høvuðsarbeiðsgevara?** | |
| 36-40 tímar | 31% |
| 41-50 tímar | 26% |
| 25-35 tímar | 17% |
| Meiri enn 50 tímar | 16% |
| Minni enn 25 tímar | 7% |
| Veit ikki | 3% |
| **Bústaðarøki** | |
| Tórshavnar Kommuna | 42% |
| Eysturoy | 21% |
| Norðurstreymoy og Vágar | 13% |
| Norðoyar | 12% |
| Sandoy og Suðuroy | 11% |

Alfred er ein starvsmiðil, sum knýtir saman starvsfólk og arbeiðsgevarar. Alfred ger tað lætt hjá starvssøkjandi at finna rætta starvið og arbeiðsgevarum at finna rætta starvsfólkið.

Á alfred.fo kunnu fólk gera sær ein vanga, leita eftir størvum og fáa beinleiðis boð um størv ið passa til teirra førleikar og ynski. Arbeiðsgevarar kunnu lýsa við størvum, sýna fram sítt starvsfólkabrand og finna starvsfólk, sum hóska til teirra arbeiðspláss. Harumframt kunnu arbeiðsgevarar handfara alla setanargongdina á ein tryggan og lættan hátt í Alfred setanarskipanini.

Alfred veitir allar tænastur innan starvssetanir - frá lýsing til setan - bæði viðvíkjandi innihaldi, strategi, starvsfólkabranding og setanargongdum.

Alfred stendur eisini fyri greiningum og kanningum, sum geva arbeiðsgevarum betri innlit í rák á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Henda frágreiðingin er partur av hesum arbeiði.

www.alfred.fo